## ... um at flyta heim at arbeiða

Fyri fyrstu havi eg fingið eina spennandi avbjóðing í Svøríki, og tað hevur mín fyrsta prioritet nú, men eg skal ikki útiloka nakað. Eg eri jú føroyingur og havi familju her, so tað kann verða, at eg flyti heim at arbeiða seinni, men tað fer tíðin at vísa.



## ... um flogbólt

Eg var við á flogbóltslandsliðnum á Oyggjaleikunum í Hetlandi, men síðani eg fór til USA, havi eg ikki gjørt tað stóra við flogbóltin. Eg venji tó eitt sindur við mínum fyrrverandi felagi, SK Århus, og nú tær hava havt nakrar skaðar, havi eg hjálpt teimum eitt sindur. Men meira fái eg tíverri ikki tíð til.

# ølunum



*- Hevði eg møguleikan at at granska okkurt í Føroyum, so kundi tað verið áhugavert, men eg eri nógv bundin av hagtølum, og tey eru ikki so góð í Føroyum, sigur Juanna Schrøter Joensen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

á universitetinum í Stockholm, sum verður roknað sum tað besta universiteti innan búskaparfrøði í Europa, og tá eg fekk tann møguleikan, kundi eg ikki siga nei. Tað er eisini universitetið í Stokholm, sum stendur fyri at lata Nobel-virðislønini í búskaparfrøði, so tað er eisini spennandi.

- Eg komi tó eisini at hava eitt sindur av tilknýti til universitetið í Århus. Tey fara møguleika at keypa meg leysan frá mínum starvi í Stockholm í styttri tíðarskeið, so eg kann arbeiða eitt sindur í Århus eisini. Tað er vanligt, at adjunktar arbeiða eina tíð í onkrum øðrum landi, enn har teir hava sítt starv.

Starvið sum adjuktunt ur er lutvíst undirvísing og lutvíst gransking, og Juanna manglar ikki hugskot til sína gransking.

- Eg havi fleiri hugskot um, hvat eg kann fara at granska í. Okkurt av tí, sum eg havi arbeitt við í míni PhD-ritgerð, fari eg at gera meira við.

- Hevði eg møguleikan at at granska okkurt í Føroyum, so kundi tað verið áhugavert, men eg eri nógv bundin av hagtølum, og tey eru ikki so góð í Føroyum. Danmark, Noreg og Svøríki eru millum tey bestu londin í heiminum til hagtøl um fólk. Eg kann brúka persónsnummarið hjá fólki og familjum og á tann hátt fylgja teimum í mínari gransking.

- Hagtøl er ikki tað, sum mann hevur mest av í Føroyum, og tað er ein stórur vansi fyri granskingina. Hevur tú ikki hagtøl, so verður alt bara teoretiskt, og tú kanst ikki royna tína teori og finna út av, um hon hevur hald í veruleikanum, sigur Juanna.